# Sosialurin

Nr. 209 • týsdagur • 4. november 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo







## Hondbóltsdømingin skal eygleiðast

Ítróttur síðurnar 27-34

## Flúgvandi fjallgonga

Blaðfjallmaðurin fór frá húsum úr Vágum á fjall eystantil á Borðoynni og var við hús aftur alt innan fýra tímar. So lætt kann tað gerast, tá nútímans akfør verða tikin í nýtslu í hesum siðbundna yrki.

Reportasja síða 6-7





Mentan á 800 fermetrum:

## Runavíkingar fáa stórt mentunarhús

Síða 15



Norðurbryggjan letur upp:

## Portur til útnorður

síða 8

Protektionisma:

# Ein roynd at varðveita vald

**Tað er fyri at varðveita løggávuvald í Føroyum, at Gjaldskipanin hjá Elektron nú verður steðgað fyri víðari menning. Tað sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum. Bæði hann og formaðurin í Rættarnevndini viðganga, at talan er um rest av protektionismu, ið stavar frá 1994**


GJALDSKIPAN

*Ingi Rasmussen*

*ingi@sosialurin.fo*


Elektron verður vart, hóast tað ikki vil verjast. Bæði Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, og Jógvan á Lakjuni, formaður í Rættarnevndini, viðganga, at talan er um protektionismu, nú forðað er Elektron at fara víðari við Gjaldskipanini.

Dátueftirlitið tók 28. oktober avgerð um Gjaldskipanina hjá Elektron og peningastovnunum, sum avgreiðir peningaflytingar fyri fólk umvegis BetalingService hjá PBS. Talan er ikki um persónsvernd men um vinnupolitikk, segði forkvinnan í Dátueftirlitinum við Sosialin fríggjadagin, og tað helt hon ikki hoyra heima í lógini um persónsupplýsingar. Danmark er eitt trygt land og upplýsingarnar, talan er um, eru ikki viðkvæmar, og sostatt hevur málið einki við trygd hins einstaka at gera, segði hann.

– Tað er ivaleyst rætt, at talan er um protektionismu. Tað hava vit ongantíð fjalt. Men tað er ein spurningur um, hvørt tað er rætt at hava vinnuforðingar í eini lóg um vernd av persónsupplýsingum. Tað er tað helst ikki. Byrjanin til alt málið stavar heilt aftur frá 1994, tá vandi var fyri, at peningastovnarnir fluttu alt edv-samskifti av landinum. Tað varð forðað tá, og hetta við, tá lógin frá 2001 kom fyri tingið, sigur Jógvan á Lakjuni.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til rættarmálið, sum er reist ímóti løgmálaráðnum, men hann viðgongur, at ásetingarnar um peningastovnarnar eru ein partur av løgtingsavgerð frá 1994, sum skuldi forða peningastovnunum at flyta sítt edvsamskifti av landinum.

– Hetta er ein spurningur um at varðveita persónsupplýsingar undir føroyskum løggávuvaldi. Peningaflytingar millum føroyingar skulu gerast í Føroyum. Um alt spakuliga fer av landinum, missa vit løggávuvaldið á økinum, sigur hann.

síða 9





pf Klement Petersen

Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460




J.C. Svabosgøta 8
FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772
Fartel. 215 778

Ætlanir um eina ráðstevnu?
- vit skipa fyri ...

Flutningur
Gisting
Fundar- og ráðstevnukarmar
Útferðir
Bilaleiga
Undirhald

Ring og hoyr nærri!

Green Gate Incoming
Tel 350 520
www.greengate.fo

Nilfisk Advance



umboð Blikka
tel 356666